Summar AFTURLIT

# Síðsta summarið hjá einum stríðsmanni

**ÚT ER KOMIN BÓK** VIÐ MEIRA ENN **800 BLAÐSÍÐUM**, SUM LÝSIR STRÍÐIÐ UPP UNDIR OG EFTIR **FÓLKAAKVØÐUNA 14. SEPTEMBER Í 1946**. ÓSEMJA ER LONGU BROSTIN Á UM, HVUSSU KELDURNAR OG ÚRSLITIÐ **SKULU TULKAST**, MEN SPELL HEVÐI VERIÐ, UM LESARAR FRÁSØGDU SÆR MØGULEIKAN AT **UPPLIVA HESA SØGULIGU HENDING**. ZAKARIAS WANG HEVUR Í BÓK SÍNI SAVNAÐ HÓPIN AV **ÁHUGAVERDUM SKJØLUM**, IÐ VEKJA MANGAN FARNAN POLITIKARA TIL LÍVS, EITT NÚ ODDAMANNIN Í FØROYSKU SJÁLVSTÝRISRØRSLUNI, **JÓANNES PATURSSON**, SUM DOYÐI **2. AUGUST Í 1946**



AFTURLIT

Uni Arge
uniarge@gmail.com

Fátt kann sum fólkaatkvøðan 14. september í 1946 fáa politisku sinnini í kók, og hóast liðin eru 64 ár, síðan tey, ið atkvøddu, við einum teprum meiriluta vrakaðu stjórnaruppskotið hjá donsku stjórnini og í staðin valdu loysing, er fólkaatkvøðan framvegis ljóslivandi í føroyskum blaðkjaki. Við jøvnum millumbilum stríðast sambandsmenn og loysingarmenn um, hvussu úrslitið skal tulkast, hví sjálvstøða Føroya varð av ongum, og hvønn rætt Danmarkar kongur hevði at senda løgtingið til hús 10 dagar eftir fólkaatkvøðuna.

Zakarias Wang er ein teirra, sum dúgliga hevur skrivað um fólkaatkvøðuna í bløðunum. Hann hevur ongantíð dult, hvat hann heldur um úrslitið av henni, og hvat átti at hent eftir fólkaatkvøðuna. Føroyar skuldu verið skipaðar sum sjálvstøðugt land, tí føroyingar valdu loysing, heldur hann. Hetta vísir hann eisini á forsíðuni á nýggja keldusavninum við at skriva, at 50,7 prosent valdu loysing og 49,3 prosent stjórnaruppskotið. Ger so væl, Føroya ungdómur, hetta var tað, sum hendi, vil hann siga.

Í eini frásøgn sum hesari tænir tað neyvan nøkrum endamáli at tulka úrslitið av fólkaatkvøðuni higar ella hagar. Nógv áhugaverdari hevur verið at kagað í keldurnar, sum Zakarias Wang hevur savnað saman serliga frá árinum 1946, tá mikil goragangur var um framtíðarstøðu landsins, og ósamdir føroyskir politikarar samráddust við donsku stjórnina um málið. Ósemjan endaði við, at danska stjórnin 27. mars í 1946 setti fram uppskot um, at Føroyar í nýggjari skipan vórðu verandi undir grundlógini. Fólkaatkvøða skuldi so haldast 14. september um hetta uppskotið og loysingina.

## Røða í tinginum

Mitt í stríðnum upp undir fólkaatkvøðuna var kongsbóndin í Kirkjubø og oddamaðurin í sjálvstýrisrørsluni, Jóannes Patursson. Sum 79 ára gamal helt hann 25. apríl í 1946 røðu í løgtinginum, har hann heilsaði føroysku samráðingarmonnunum, ið høvdu samráðst við donsku stjórnina stutt frammanundan. Her takkaði hann teimum fyri, at ongin teirra var gingin undir treytirnar hjá donsku stjórnini, men harmaðist um innanhýsis ósemjuna teirra millum.

Røðan hjá Jóannesi Patursson hendan dagin er í veruleikanum eitt harmaljóð um, at føroyingar semjast so illa. Hann vísir á, at 40 ár eru liðin, síðan klandur hevði við sær, at føroyingar býttu seg í Sambandsflokkin og Sjálvstýrisflokkin. Hann brigslar ongum, at hetta hendi, men ásannar, at skaði ger menn vísar, men sjáldan ríkar, og nevnir hópin av málum, sum kundu verið fingin í lag, um føroyingar samdust betur.

Valið er kortini greitt, nú danska stjórnin hevur sett fram sítt tilboð, vísir hann á. Annaðhvørt skulu Føroyar innlimast í Danmark, ella taka føroyingar valdið í egnum landi. Og ramlig eru boðini, hann gevur tingmonnum:

"Hvør, sum eygur hevur, hann má nú síggja, at hendan ósemjan, sum ríkt og rátt hevur í landinum hesi síðstu 40 ár, hon er óverjandi at uppihalda longur, og hvør maður, sum føroyingur vil eita, og sum føroyingur vil vera, hann má skilja, at nú er einans vegur at ganga, og hann er, at allir føroyingar nú taka hondum saman og draga eina línu, Føroya fullræði til endurreisingar."

## Bóndin verður 80

Jóannes Patursson hevði í 1946 sitið á tingi í 45 ár, og árið var eisini merkisvert á tann hátt, at hann 6. mai fylti 80 ár. Í keldusavninum hjá Zakariasi Wang er ein samrøða, sum Dagblaðið hevði við bóndan 3. mai. Har verður hann spurdur, hvussu tað kom í lag, at hann vildi skipa Føroyar sum sjálvstøðugt land, og hann avdúkar, at tað kom so við og við. Stríðið fyri norskum flaggi rein við hann tíðliga og eisini norska sjálvstýrisstríðið í 1905. Íslendsku vinir hansara, eitt nú Hannes Hafstein, kveiktu eisini ein brand í honum.

Fýra dagar eftir hesa samrøðuna og dagin eftir føðingardagin, tann 7. mai, prentar Dagblaðið yrking eftir Hans Andrias Djurhuus til heiðurs fyri Jóannes Patursson, og 10. mai kunnger blaðið, at Jóannes á sjálvum 80 føðingardegi sínum fekk fráboðan um, at forseti Íslands hevði veitt honum stórriddarakrossin.

Føðingardagurin hjá Jóannesi bónda 6. mai í 1946 hevur eisini við sær, at hann gevst sum tingmaður. Tann 14. mai kunnger hann í Dagblaðnum, at hann hevur sagt tingstarvið frá sær. Hann ásannar, at hetta kann tykjast onkrum skeivt at gera, nú harðast leikar á, men minnir á, at føroyingar hava eitt orðatak, sum sigur, at maður kemur í mans stað, og haraftrat skulu øll líta á, at eins og Føroya fólk í 1940 tók ræðið undir seg til havs, fer ikki leingi at dvøljast við at taka fullræði uppi á landi eisini.

Í tinginum boðar tingformaðurin frá, at Jóannes bóndi sigur tingsessin frá sær, veit Dagblaðið eisini at siga. Tingformaðurin takkaði bóndanum fyri hansara virki fyri land og fólk. Jóannes sjálvur segði nøkur orð, og Petur Mohr Dam talaði vegna Javnaðarflokkin. Síðan bað tingformaðurin tingmenn reisast og rópa eitt trífalt leingi livi fyri Jóannesi bónda, og hetta varð gjørt. Dagblaðið staðfestir, at Jóannes Patursson í 45 ár hevur ført mangar broytingar til Føroya. Navn hansara er innflættað í hesa tíð, og tíðarskeiðið fer altíð at verða bundið at navni hansara.

## Agiterar í bløðunum

Stríðið um framtíðarstøðu Føroya heldur fram í bløðunum, eftir at Jóannes bóndi hevur lagt tingstarvið frá sær, og mitt ímillum allar tær agiterandi greinirnar skrivar Dagblaðið 4. juni í 1946, at við "Drotningini" er komin til Havnar íslendski sendiharrin í Keypmannahavn, Jacob Møller. Hann fór, meðan skipið steðgaði á Havnini, vesturum til Kirkjubøar. Har handaði hann Jóannesi bónda stórriddarakrossin av falkaordaninum. Jacob Møller helt eisini røðu, og Jóannes takkaði fyri heiðurin.